**8.a flokkur**
**Miðvágs- og Sandavágs skúla**

Ungdómstingið

**Ungdómstingmál nr. 3/2012: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul**

# Uppskot
# til
# løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 174 frá 29. desember 2011, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 7, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Studningur til livikostnað kann veitast umsøkjara, ið er byrjaður útbúgving, sum er stuðulsheimilað eftir §§ 4 og 5 í hesi lóg. Tann mánaðarligi hægri studningurin er kr. 3.607, og tann mánaðarligi lægri studningurin er kr. 1.737."

2) § 4, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Talan kann vera um hægri útbúgvingar, styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingar, miðnámsútbúgvingar, partar av miðnámsútbúgvingum ella útbúgvingar á framhaldsdeildarstigi."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Viðmerkingar:**
Við verandi skipan halda vit, at stórar forðingar eru fyri, at ungdómur undir 18 ár, hættar sær víðari í skúla, tí ójavnin í stuðulsskipanini ger alt ov stóran mun á fólki.

Vísast skal á, at kunngerð nr. 107 frá 25. august 2011 má dagførast samsvarandi.

**Á Løgtingi, tann 6. februar 2012**

Siri Hellá    Tóri Nielsen    Kristina Mouritsen